Noyddist skaddur úr finaludystinum

Í fyrsta umfarinum vann Bjarni á norskum íðkara

Bjarni Hammer, sum í fleiri ár hevur gjørt um seg í kick-boxing kappingum, tók um vikuskiftið lut í opnu norðurlendsku kappingini í sonevndari full-contact.

Kappingin varð hildin í Keypmannahavn, og hjá Bjarna gekst væl. Hann tók lut í tungvekt-bólkinum, og her eydnaðist honum at vinna seg fram til finaluna.

At síggja til hevði hann eisini yvirvág í hesari, men í næsta umfarinum fekk Bjarni skaða í økslina, og eftir at hava ráðført seg við dómara og stevnulækna mátti føroyski luttakarin at enda ásanna, at her gjørdist einki. Sjálvandi eitt sindur keðiligt, at hann soleiðis noyddist at gevast, men eitt silvurmerki í kapping við sterkastu norðurlendsku íðkararnar, er heldur ikki heilt av leið.

-jm

Johannus aftur í HB

Fyrrverandi landsliðsleikarin Johannus Joensen verður komandi ár aftur at síggja í reyðu og svørtu strípunum hjá HB. Johannus spældi við HB í tíðarskeiðinum frá 1996 til 2002, og hann hevur vunnið tvey føroyameistaraheiti við felagnum. Hesi árini spældi Johannus 164 dystir og skoraði 25 mál fyri HB.

Seinastu tvey árini hevur verjuleikarin spælt við ávíkavist FS Vágum og B36.

Ein av liðfeløgunum hjá Johannusi í B36 í fjør, málverjin Tróndur Vatnhamar, er eisini farin at venja í HB.

-tn

Tryggur Mjølnir-sigur

Spenningurin var ongantíð nakar serligur, tá Mjølnir aftur skræddu seg leysar í oddinum í bestu kvinnudeildini. Mikukvøldið hødvu klaksvíkskvinnurnar vitjan av KÍF, og fimtu ferð av fimm møguligum fingu tær fult fyri ómakin.

Við settúrslitunum 25-17, 25-15 og 25-18 gjørdist talan um ein tryggan sigur til oddaliðið, sum soleiðis enn einaferð tykist stevna beint móti gullinum. Eisini hóast tað framvegis resta nógvir dystir at spæla.

-jm

Samanleggingin staðfest

Tað fer helst framvegis at vera talan um VB og Sumba í komandi kappingarárið, men á pappírinum verða tey tá eitt, og frá 2006 verða nøvnini eisini smeltað saman

SAMANLEGGING
Jákup Mørk

Fyrsta samanleggingin í Suðuroynni gjørdist nú veruleiki. Eftir miseydnaðu royndina í 90'unum, hava VB og Sumba nú aftur gjørt av at kasta saman.

Fyri á leið einum mánaði síðani høvdu feløgini limafund, har nevndirnar fingu tilsøgn um at arbeiða víðari við ætlanunum, og mikukvøldið varð úrslitið av hesum arbeiði so lagt fyri eykaaðalfundir.

Og her var eingin ivi. Í Sumba atkvøddu 22 av 24 frammøttum limum fyri uppskotinum. Ein atkvøða var blonk og ein atkvøddi ímóti. Í Vági var meirilutin ikki heilt so greiður, men kortini var ikki stórvegis ivi. 25 atkvøddu fyri, 14 ímóti og tvær atkvøður vóru blankar. Sum skilst, so var huglagið til fundin í Vági tó sera postivt, og eisini tey, sum atkvøddu ímóti samanleggingini, søgdu seg vilja stuðla nýggja felagnum av fullum hjartað.

Uppleggið klárt í smálutum

Og gongst alt eftir ætlan, so verður talan eisini um spildurnýtt felag. Eitt felag, har allir aktivitetir hjá bæði Sumba og VB verða lagdir.

Nevndin í nýggja felagnum fer nú undir at fáa formligu viðurskiftini upp á pláss, og har eru so framvegis onkrir snøklar eftir at loysa. Eitt nú er ynski hjá bæði VB og Sumba, at liðini í nýggja felagnum hetta fyrsta árið framvegis koma at bera gomlu heitini, og at tey framvegis koma at spæla í gomlu búnunum. Hetta tí VB og Sumba fylla ávíkavist 100 og 65 ár í 2005. Eisini er gjørt av, at besta lið felagsins skal spæla í Vági, og at næst besta liðið skal spæla í Sumba.

Eftir hetta skulu øll lið felagsins tó eita Sumba/-VB. Uppleggið, sum varð samtykt mikukvøldið, inni helt eisini eina avtalu um, at felagið um í mesta lagi fýra ár skal hava nýggjar búnar, sum greitt boða frá, at talan er um nýtt felag.

Í uppleggingum skilst annars, at nevndirnar hava lagt eitt sera stórt arbeiði í at avtala allar smálutir, soleiðis at einki óneyðugt stríðsmál seinni skal taka seg upp. Eitt nú hvussu verður við ymsu tiltøkunum, sum feløgini frammanundan hava fyriskipað hvør sær. Herundir stevnur, lutaseðlasølur v.m.

Og kanska mest týðandi, so verður nýggja felagið eisini styrkt á leiðslusíðuni. Avrátt er nevnliga, at starvsfólk skal setast hálva tíð. Bæði fyri at fáa eina betri samskipan, men eisini fyri at liva upp til krøvini, sum UEFA nú setur. Hesi krøv vóru annars upprunaliga við til at skumpa undir samanleggingina av feløgunum.

Heilhjartað

Og sum skilst, so verður talan so heldur ikki um nakra hálvhjartaða royndi.

Ein av orsøkunum til, at samanleggingin ikki eydnaðist so væl fyri 10 árum síðani, var uttan iva, at feløgini tá gjørdu eina avtalu um eitt royndarár. Tað vil við øðrum orðum siga, at partarnir kanska ikki arbeiddu so hart fyri hesum, tí teir vistu, at tað uttan stórvegis hóvasták bar til at bakka aftur til gomlu støðuna.

Soleiðis verður í øllum førum ikki hesaferð. Ivaleyst eisini við nýliga slitinum av FS Vágar í huga, verða viðtøkurnar í nýggja suðuroyarfelagnum soleiðis háttaðar, at tað skal vera breið semja um slit, áðrenn eitt møguligt slit skal gerast veruleiki. Og um so er, at eitt slit einaferð kemur upp á tal, so er eisini longu nú avrátt, hvussu feløgini tá skulu býta liðini millum sín. Tá verður hetta gjørt á tann hátt, at VB fær besta mansliðið, Sumba tað næstbesta o.s.fr. Altso verður hetta gjørt út frá støðuni, sum hon sær út á fótbóltskortinum 2004.

Flogbóltur

Meistaradeild, kvinnur

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	5	5	-	0	15	3	12	10
2 TB	5	4	-	1	12	6	6	8
3 KÍF	5	3	-	2	9	8	1	6
4 Dráttur	5	2	-	3	12	10	2	4
5 ÍF	5	1	-	4	5	12	-7	2
6 SÍ	5	0	-	5	1	15	-14	0

Hondbóltur

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

	dystir	v	-	j	-	t	v. mál	t. mál	mál-munur	stig
1 VB	6	5	-	0	-	1	183	128	55	10
2 Neistin	7	5	-	0	-	2	212	158	54	10
3 Stjørnan	5	5	-	0	-	0	138	104	34	10
4 Søljan	6	3	-	0	-	3	176	151	25	6
5 VÍF	5	2	-	0	-	3	124	135	-11	4
6 StÍF	5	1	-	1	-	3	119	134	-15	3
7 Kyndil	5	0	-	1	-	4	92	146	-54	1
8 Tjaldur	5	0	-	0	-	5	98	186	-88	0

Máltindurin:

Nicoleta Radu Hansen	Søljan	64 (10)
Ioana Rápa	VÍF	64 (20)
Simona Petersen	Neistin	63 (14)
Daiva Tuomaite	VB	56 (24)
Aukse Vysniaskaite	VB	39 (1)
Lina Andriulyte	Søljan	38 (2)
Vesna Tomajek	Tjaldur	38 (18)
Marjun Tróndarson	Neistin	37 (2)
Lotte Sørensen	Kyndil	35 (10)
Ása Dam á Neystabø	Neistin	33 (2)
Alina Olaru	Stjørnan	33 (4)
Heidi Maria Akselsen	Søljan	28
Rannvá Augustinussen	VB	26
Rebekka Justinussen	StÍF	26 (5)
Poula D. Olsen	StÍF	25

Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

Deildarleiðari til goymsluna

Starvið sum deildarleiðari á goymsluni á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er vanligar gerandisdagar frá kl. 7.00 til kl. 15.00.

Goymslan hevur umleið 7.000 ymiskar vørur og umsitur fyri umleið 13 milliónir krónur um árið. Hon umsitur innkeyp/móttøku/sølu/uppfylling á deildunum á Landssjúkrahúsinum, sølu til Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahús, røktarheimini, bústovnar, heimarøktin og onnur viðskiftafólk innan heilsuverkið.

Tað starvast í løtuni 6 starvsfólk á goymsluni.

Umsøkjarar við sjúkrarøktarfakligari útbúgving við handils/leiðslu-yvirbygnaða hava fyrimun.

Førleikakrøv:
- faklig vitan innan tól og vørur, sum dagliga verða nýtt í røktini á sjúkrahúsum
- royndir innan innkeyp, goymslu- og vørustýring
- leiðsluroyndir
- edv-kunnleiki á brúkarastøði (Navision Financials forrrit verður brúkt)

Eginleikar:
- góður røkjuskapur
- góð samstarvsevni
- positiv/ur við tænastusinni

Setanartreytir
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Malenu Meitelberg, leiðara á goymsluni.
Telefon 30 45 99 – 1163 ella
e-post malenam@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 6. desember 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um støry við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"

Sosialráðgevi á Almannastovuni

Eitt starv sum barnsburðaravloysari fyri sosialráðgeva við tænastu á økisdeildini í Tórshavn er leyst at seta sum skjótast. Starvið er fulltíðarstarv.

Um deildina
Á Økisdeildini í Tórshavn arbeiða 14 fólk: deildarleiðari, 8 sosialráðgevar og 5 málsviðgerar. Økið hjá deildini er Streymoy, Vágar, Nólsoy, Hestur, Skúvoy og Sandur. Starvið kann innibera ferðing.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er
- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensiónir

Førleikakrøv
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni til umstilling og tola til tíðir stórt arbeiðstrýst
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

Lønar- og setanarviðurskifti
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara á tlf. 35 35 10.

Umsóknarfreist
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Jónas Broncksgøta 27, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi innan 24.11.2004.

Um Almannastovuna
Almannastovan er skipað við almannamiðstøðum í Tórshavn, í Suðuroy, í Eysturoy og í Norðoyggjum, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Harumframt eru Hjálpartólamiðstøðin og aðrar landsdekkandi serdeildir partar av Almannastovuni.

Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.

Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.

Stovnurin umsitur 800 mill. kr. og vit eru ialt 90 fólk í starvi.

Aðalfundurin

hjá Dansifelagnum Fragdini
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík
sunnukvøldið 5. desember kl. 21.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Dansifelagið Fragdini

Sosialráðgevi á Almannastovuni

Søkt verður eftir sosialráðgeva til Økisdeildina í Norðoyggjum at byrja sum skjótast ella 1. januar 2005. Starvið er fulltíðarstarv.

Um deildina
Økisdeildini í Norðoyggjum er normerað til: deildarleiðara, 2 sosialráðgevar og 2 málsviðgerar. Økið hjá deildini er Norðoyggjar.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er:
- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av eru:
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensiónir

Førleikakrøv
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni til umstilling og tola til tíðir stórt arbeiðstrýst
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

Lønar- og setanarviðurskifti
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, deildarleiðara á tlf. 457240.

Umsóknarfreist
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Jónas Broncksgøta 27, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi innan 24.11.2004.

Um Almannastovuna
Almannastovan er skipað við almannamiðstøðum í Tórshavn, í Suðuroy, í Eysturoy og í Norðoyggjum, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Harumframt eru Hjálpartólamiðstøðin og aðrar landsdekkandi serdeildir partar av Almannastovuni.

Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.

Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.

Stovnurin umsitur 800 mill. kr. og vit eru ialt 90 fólk í starvi.

Sosialurin -har tað hendir